# Kringvarpsstjórin væl nøgd við ólavsøkudekning

**Hóast Sjónvarp Føroya sendi væl minni frá ólavsøkuni í ár enn undanfarin ár, er stjórin í kringvarpinum, Annika M. Jacobsen, sum heild væl nøgd við samlaða dekningin av tjóðarhátíðini**

KRINGVARP
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á ólavsøku í ár valdi Kringvarp Føroya at leggja mestu orkuna í útvarpsfrásagnir. Avgerðin hevði við sær, at sjónvarpið ongi verulig journalistisk innsløg hevði, har tað eitt nú bleiv prátað við ólavsøkugestir ella fólk vóru boðin inn í sjónvarpsstovuna til prát ella framførslur.

### Øðrvísi raðfesting

Hóast ein ávís ónøgd hevur verið at hoyrt um, at júst hesin parturin av sjónvarpsfrásagnum ikki var við í ár, er stjórin í Kringvarpi Føroya, Annika M. Jacobsen, sum heild væl nøgd við samlaða dekningin.

Hon vísir á, at sjónvarpið sendi frá øllum teimum føstu tættunum, meðan útvarpið sendi væl meir og var betri mannað enn vanligt.

Men røkir sjónvarpið sínar public service skyldur nóg væl við bert at seta eitt myndatól upp, og stórt sæð bara lata myndirnar tala fyri seg sjálvar?

- Tað dugi eg ikki ikki rættiliga at siga. Hetta var ein raðfesting, sum vit valdu at royna í ár. Eftir mínum tykki var samlaða tilboðið gott, men tað kann altíð hugsast, at okkurt kundi verið øðrvísi. Tað er nakað vit fara at tosa um, nú vit fara at eftirmeta dekningin av ólavsøkuni, sigur Annika M. Jacobsen.

Sum skilst kunnu hyggjara heldur ikki vænta, at meir verður at síggja frá ólavsøkuni í seinni sendingum.

- So vítt eg veit, er onki tilfar frá ólavsøkuni í umbúna, sum ætlanin er at senda seinni, sigur stjórin í kringvarpinum.

### Fylgdi tilmæli

Júst hví avgerð varð tikin um, at skerja sjónvarpsfrásagnirnar heldur enn útvarpsfrásagnirnar, veit Kringvarpsstjóri ikki rættiliga at siga.

- Eg valdi at fylgja tilmælinum, sum kom frá bólkinum, ið legði ólavsøkudekningin til rættis, sigur Annika M. Jacobsen, sum ikki veit, um hædd varð tikin fyri hyggjaratølunum á ólavsøku í hesum viðfangi.

- Eg leyt á, at tilmælið frá bólkinum tryggjaði ein samlaðan góðan dekning, sigur hon.

Í samband við raðfestingina av ólavsøkudekningini minnir Annika M. Jacobsen á, at stovnurin er í eini broytingartilgongd, har finnast skal fram til nýggjar leistir fyri virksemið. Tí fær hon illa sagt longu nú, hvussu nógv hyggjarar kunnu vænta at síggja frá ólavsøkuni næsta ár.

- Tað verður uttan iva nakað av tí, vit fara at tosa um, saman við nýggju deildarleiðararnum, sum verða settir í starv í næstum. Teir skulu millum annað verða við til at stinga framtíðarvirksemið hjá stovninum út í kortið, sigur Annika M. Jacobsen, stjóri í Kringvarpi Føroya.



*Stjórin í Kringvarpi Føroya, Annika M. Jacobsen, veit ikki at siga, um hyggjarar kunnu vænta at síggja meir frá ólavsøkuni næsta ár*

# Taka ónøgd til eftirtektar

**- Vit eru fullgreið yvir, at øll ikki vóru líka væl nøgd við sjónvarpsdekningin av ólavsøkuni, sigur leiðarin á programdeildini í sjónvarpinum, sum fer at taka ónøgdina til eftirtektar**

KRINGVARP
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sambært stjóranum í Kringvarpinum, Anniku M. Jacobsen, bygdi avgerðin um at skerja sjónvarpsfrásagnirnar frá ólavsøkuni á eitt tilmæli, sum kom frá bólkinum, ið legði ólavsøkudekningin til rættis.

Ábyrgdina fyri hesum bólkinum hevði Ivan Niclasen, programleiðari.

Hóast hann sum heild heldur, at samlaði dekningurin var í lagi, dylur hann ikki yvir, at okkurt kundi verið øðrvísið.

### Umhugsað konseptið

- Vit hava seinni hoyrt, at fólk vóru hørm um, at innsløgini um kvøldaranar við gestum í sjónvarpsstovuni og prát við fólk á gøtuni ikki vóru við í ár. Slíkar atfinningar taka vit í fullum álvara og taka tær sjálvandi til eftirtektar, nú vit fara at eftirmeta ólavsøkudekningin, sigur Ivan Niclasen.

Í sambandi við ónøgdina, sum hevur verið at hoyrt, heldur Ivan Niclasen, at fólk hava lyndi til at gloyma, at stovnarnir eru samanlagdir.

- Í ár valdu vit at vísa myndir frá øllum hæddarpunktunum, meðan útvarpið tók sær av at gera stemningsreportagur, prát við fólk og annað ein stóran part av døgninum. So samlað sær haldi eg avgjørt, at dekningurin var á góðari leið. Men um tað serliga eru myndareportagur fólk vilja hava, so mugu vit umhugsað hesa rað-festingina av nýggjum, sigur Ivan Nicalsen, sum leggur afturat, at enn finnast ongi hyggjaratøl, sum vísa, hvussu nógv fólk hyggja eftir sjónvarpi á ólavsøku.